Trø út um miðbýin

Tórshavnar býráð letur í ár trø at planta bara til fólk, sum búgva uttan fyri miðbýin

Aftur í ár fer Tórshavnar kommuna at lata borgarum sínum trø at planta.

Í ár verður tiltakið eitt sindur øðrvísi. Nógv er plantað í teimum eldri býarpørtunum, og kommunan vil nú heldur útvega trø til teirra, sum búgva í útjaðaranum.

Í útjaðarunum lívir ikki altastaðni líka væl, og vakstrarlíkindini eru verri tey frystu árini. Tí verða í ár útflýggjaðir plantipakkar við fleiri smáum trøum í staðin fyri at lata eitt stórt træ. Tey smáu trøini hava betri møguleikar enn tey stóru at koma fyri seg har, og tey skulu ikki bindast upp, sum neyðugt hevur verið við teimum stóru trøunum.

Tey húski í Tórshavnar og Argja kommunu, sum kunnu hugsa sær ein tílíkan pakka við trøum, skulu

Tey plaga at standa í longum røðum fyri at fáa ókeypis trø at planta frá kommununi

mánadagin 15. mai klokkan níggju venda sær til fólkaeftirlitið á Vaginum og har fáa ein útflýggingarseðil, og trøini verða útflýggjað fríggjadagin á gróðurstøðini í Hoydølum.

Hvørt húski kann fáa ein pakka, men bara tey húski, sum búgva uttan fyri Frælsið, J. Paturssonargøtu, Dalavegin, Pedda við Steins gøtu og framhaldið av henni yvir í R. C. Effersøesgøtu og Jónas Broncks gøtu.

50 plantupakkar eru til. Tey, sum koma fyrst til fólkayvirlitið, fáa pakka. Fólk mugu sjálv møta, og tað hjálpir hvørki at ringja ella bíleggja seðil.



Barna- og ungdómstelefonin
hjá Barnabata/Reyða Krossi svarar mánadag frá kl. 16–18. Tlf. 10645.

Veðurtænastan á Veðurstøðini
Upplýsingar um veðrið á veðurstøðunum kunnu fáast við at ringja á tlf. 12210.

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: BANDADANSUR

B	I	N	Í	B	R	Á	A	N	S	H	E	L	L	I	20	
L	I	Á	S		O	S	T		Á	Á		Ú				
V			P		V		Á	V	K	V	I	S	T	A		
A	N	D	E	N	E	S			Á	S			A	J	A	K
S	O	R	G		R	O	T	T	U	H	Á	L	Á	R		
T	R	E	I	N		Đ	U	N	N	U	V	E	L		T	
Á	R	I	L	D		O	R	T		E		Y	D		I	
K	Á	V	I		O	M	M	U	S	Y	S	T	R	A	R	
K		Á	N	G	R	A		N	A		N	A	I	N	A	
V	N	N		U	M		V	N		N	O	R	Đ	A	N	
R	A	D	A	R	A	R		Á	N	K	R	I		N	A	
	L	I	K	V	Đ		E		M	+	T	R		B	A	
S	V				A	R	A	N			I	K	A	S	T	
V	I	N	S	Æ	L	U	R		G	F		R	L		Ó	
Í			Á	B	U	R		S	I	L	K	I	L	Í	N	
N	O	R	B	A	R	A	+	H	O	R	N		M	I	M	I

Vinnari: Poul Olsen, Reynstún 10, kj., 160 Argir

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin eru allar tær 6 »SKEMT-bøkurnar« hjá Óla Petersen.

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Loysnunarorðið:

Navn

Bústaður

Bygd/býur

